## Bilar



**Magnus Gunnarsson**
*maggi@sosialurin.fo*

# Kinesiskur og enskur MG

Framleiðslan av einum nýggjum MG er nú byrjað á gomlu verksmiðjuni í Birmingham í Onglandi.

Tað var í 2005 at kinesarar keyptu bilmerkini MG og Rover og fluttu framleiðsluna til Kina. Í dag er tað SAIC (Shanghai Automotive Industry Corporation), sum eigur MG og Rover. Bilarnir verða framvegis gjørdir í Kina, og Rover hava skift navn til Roewe.

Fyri fyrstu ferð í mong ár kemur nú ein heilt nýggjur MG á marknaðin. Talan er um MG 6, sum verður framleiddur bæði í Kina og í Onglandi. Navnið MG stendur fyri Morris Garage, og vóru MG í mong ár smáir sportbilar og sportútgávur av teimum vælkendu Morris og Austin bilunum hjá BMC (British Motor Corporation).



*Rover 75 verður framvegis gjørdur í Kina og eitur Roewe 750*




*Hesin nýggi MG 6 verður framleiddur bæði í Kina og í Onglandi*



# Larmur í ferðsluni

Ein nýggj kanning hjá alheims heilsustovninum WHO er komin til ta niðurstøðu at larmurin frá ferðsluni í ES, og øðrum vesturevropeiskum londum, er atvoldin til at fólk gerast sjúk.

Í kanningini skjalprógvar WHO samanhang millum ferðslularm og hjarta- og karsjúkur. Sjúkurnar koma serliga av, at náttarsvøvnurin verður avbrotin, og fólk fáa ikki frið at sova.

## Týsdagin 3. mai kl. 17.10

Av tí at fótbóltssendingin 3. hálvleikur kom ístaðin fyri Vinnu- & Bilradio leygardagin kl. 17, verður sendingin endursend týsdagin kl. 17.10. Í sendingini verður vitjað hjá Hjálpirót, sum er ein gartnara og anleggsfyritøka við sera fjølbroyttum virksemi. Samrøður eru við Torben Schneider, stjóra í fyritøkuni, og við Óla Hera Joensen, sum er fyrrverandi skrivstovumaður og nú starvast við grótlaðing hjá Hjálpirót. Eisini er samrøða við Halfdan Bock Andersen, handilsketustjóra hjá fyritøkuni Würth, ið hevur fimm sølumenn í Føroyum.



**Halfdan Bock Andersen**



**Óli Heri Joensen og Torben Schneider**

Vinnu- & bílradio á Bás